# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*»Eg havi arbeitt her í 43 ár tilsamans. Børnini hjá mær eru farin aðrar vegir, og tískil tekur eingin yvir, og handilin noyðist at lata aftur«*

*Una Hansen, sum nú gevst at reka handil í Nólsoy*

# Mjørkin økti um spenningin á G!



*Í morgun vóru longu 200 tjøld sett upp á G!*

**Toka og aftur toka. Soleiðis sá út í summum pørtum av Føroyum í morgun. Men sýnið bleiv betri, og í Gøtu vónaðu tey, at serflogfarið við Kaizers Orchestra fór at lenda í Vágum**

TÓNLEIKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Jón Tyril og annars øll G!-hugað hava uttan iva sitið sum á nálum fyrrapartin í dag.

Í morgun var nevniliga rættiliga fitt av toku í høvuðsstaðarøkinum, men í Vágum sá út til at vera betri sýni.

Orsøkin til hesa møguligu pipran var nevniliga, at G!-Festivalurin hevur satsað nokk so fitt hesaferð. Eitt av høvuðsnøvnunum, ið G!-fyrireikararnir ikki himprast við at kalla eitt av heimsins bestu live-orksetrum, Kaizers Orchestra, skuldi koma við flogfari, ið festivalurin hevði leigað bert til hetta høvi. Hetta er fyrstu ferð í føroyskari tónleikasøgu, at eitt flogfar er leigað bara til tónleikarar og teirra fylgi.

Kaizers Orchestra hava nevniliga úr at gera í hesum døgum. Í gjárkvøldið spældu teir í Arendal í Noregi, í kvøld spæla teir væntandi í Gøtu, og longu í annaðkvøld trína teir á pallin í Mo í Rana í Noregi.

Ætlanin var, at flogfarið Kaizers Orchestra skuldi seta seg í Vágum, og tí bar ikki til at frætta, um hetta eydnaðist, áðrenn blaðið varð prentað. Við í flogfarinum var eisini bólkurin Animal Alpha.

Jón Tyril, fyriskipari sigur tó við Sosialin, at tey hava tikið fyrivarni ímóti sonevndum "samferðsluforðingum".

– Tað mást tú taka við, tá tú býrt í Føroyum, sigur Jón Tyril.

Annars verða allir festivaldagarnir merktir av, at útlendskir sangarar og tónleikarar koma til Føroya við flogfari. Eitt nú koma Outlandish í morgin, men í mun til Kaizers Orchestra hava teir ein dag at dúva uppá, um veðurgudarnir skuldu spælt gøtufólki og festivalgestunum eitt puss.

Jón Tyril vil einki siga um, hvussu stór íløgan hjá G! er, nú flogfar verður leigað bara til at flyta tónleikarar hendanvegin. Men hann dylur ikki, at hetta er størsta seríløgan higartil hjá G!, og at hetta hækkar ferðaroknskapin hjá festivalinum munandi. Men hann letur væl at flogfelagnum, sum hann sigur hevur dugað væl at lagt ætlanir, og at tey á G! gera hetta við gleði, sum hann tekur til.

**8000 atgongumerki**

Hann letur væl at atgongumerkjasøluni, hóast hann fyrrapartin ikki visti nágreiniliga, hvussu nógv atgongumerki vóru seld. Jón tyril sigur tó, at sølan hevur víst eitt annað mynstur í ár í mun til í fjør av tí tað hevur gingið javnari í ár.

– Nú hevur sølan tikið dik á seg. Vit hava selt meira undan festivalinum í ár, hóast tað gekk eitt sindur seinni til speedarin fór í botn í ár, sigur Jón Tyril.

Í fjør vórðu 6000 atgongumerki seld, men í Gøtu verður mett, at tilsamans mundu eini 8000 vera á G!, um tey rundan um økið og í bátum verða tald við. Hetta er tó ber

Hesaferð eru 8000 atgongumerki prentað, og stik er rundan um økið, so betri eftirlit er við, hvussu nógv fólk er inni á festivaløkinum.

Jón Tyril, at í morgun vóru eini 200 tjøld sett upp, og at sølan tí var fyribils steðgað, hóast tjaldingarplássini ikki vóru útseld, so ikki ov nógv fólk koma inn á økið.


## Starv á lønarstovuni á Føroya Gjaldstovu



Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Í-Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle Financials. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar: Felags lønarskipan, Búskettskipan, Leiðslukunningarskipan og Dátuvøruhús.

- Lønarstovan hevur um hendi stóran part av almennu lønaravgreiðslunum. Deildin umsitur Felags Lønarskipanina og ráðgevur í brúki av skipanini og nýstovnaðu WEB-løn veitingini.
- Arbeitt verður í løtuni at skipa eina Felags Lønarfyrisiting fyri landið, sum umfram at fyrisita Felags Lønarskipanina fer at fevna um tænastumannaeftirlønir, HR-umsiting og ráðgeving.
- Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

Í løtuni eru 130 brúkarar í Felags Lønarskipanini

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**

Í sambandi við, at eitt av starvsfólkum okkara fer í annað starv, søkja vit eftir fólki at byrja beinanvegin.

**Uppgávurnar eru at:**
- Skráseta og málsviðgera lønir
- Koyra lønir
- Rætta lønir
- Bóka lønir
- Svara lønarfyrispurningum

**Útbúgvingarskrá verður gjørd fyri starvið, soleiðis at tú sum fráliður kann røkja uppgávur á hægri stigi og eisini nýggjar uppgávur. Talan er í høvuðsheitum um at:**
- Umsita felags partarnar av felags lønarskipanini, herundir seta upp og viðlíkahalda sáttmálar, lønartalvur, lønarsløg, starvsheiti
- Gera brúkaravegleiðingar, mannagongdir og skipa brúkaraundirvísing
- Ráðgeva viðvíkjandi skipanini annars
- Gera úttrekk úr skipanini
- Seta í verk lønarskipanina úti á stovnunum
- Seta í verk webb-partin av lønarskipanini
- Skapa og yvirføra lønarhagtøl til og at gera úttrekk úr Dátuvøruhúsi

**Krøv til starvið:** Av tí at EDV-skipanir stuðla øllum arbeiðinum á gjaldstovuni, er ein fyritreyt fyri arbeiðinum, at tað fellur tær lætt at brúka EDV og at seta teg inn í nýggjar loysnir. Tað verður gjørd útbúgvingarskrá fyri starvið, so formlig útbúgving er ikki kravd, men hevur tú júst lokið HH-útbúgvining e.t., so er hetta ein møguleiki. Tú skal vera álítandi, røkin og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og er lønt í flokki III. Møguleiki er at koma í hægri flokk sum fráliður, tá vitan og førleiki bera í sær, at tú røkir uppgávur á hægri stigi. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Guðny Simonsen, sum er at hitta á tlf. 352410 ella 214965.

**Umsókn:** Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða send til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 27. juli 2006.

Dimmalætting



# Lívdarveggir



**STUBBIN** Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo